# Edmund Joensen ber grov ósannindi í síni herferð móti Uttanríkisráðnum

HØGNI HOYDAL



**Edmund Joensen hevur valt støðugt at bera rong tíðindi um Uttanríkisráðið og undirritaða í almenninginum. Tað kann ikki góðtakast, at villleiðing og ósannindi eru amboðini til persónligan partapolitiskan vinning og at leggja vertin á týðandi felags áhugamál**

Tað tykist sum eitt høvuðsendamál í sjálvum sær hjá Edmund Joensen, fólkatingsmanni, at seta føroyska Uttanríkisráðið og undirritaða í ringt ljós

Vit kenna hendan framferðarhátt, sum hevur grivið so nógvar gjáir í føroyskan politikk og hevur gjørt tað trupult at røkja føroysk áhugamál í útheiminum á skilvísan hátt. Men hetta er so hansara val og rættur at gera – vit kunnu bert harmast um, at vit ikki eru komin longur fram á leið í føroyskum politikki.

Men tað kann ikki góðtakast, at Edmund Joensen støðugt velur at bera rong tíðindi og ósannindi fram, sum skulu tæna hansara persónligu endamálum

Lat meg bert nevna nøkur teirra:

**1. "Bygningur í New York"**

Í tíðindaskrivi leggur Edmund Joensen meg undir at hava sagt, at Uttanríkisráðið ætlar at keypa ein bygning í New York. Hesi tíðindi eru ósonn, og íspunnin av Edmundi Joensen.

**2. "Alment dulsmál"**

Í sama skrivi sigur Edmund Joensen, at føroyskur uttanríkispolitikkur er eitt alment dulsmál, og at tingið ikki er kunnað um ætlanirnar hjá Uttanríkisráðnum. Hann sigur, at "formliga eigur landsstýrismaðurin at kunna uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum, men hon hevur ikki fingið upplýsingar...". Hetta er eisini ósatt.

Í fíggjarlógini er væl og virðiliga kunnað um, hvussu pengar verða nýttir. Og – sum formaðurin í Uttanlandsnevnd Løgtingsins hevur víst á – hava vit kunnað Uttanlandsnevndina frá fyrsta degi um ætlanirnar, og hava fingið góðar viðmerkingar og uppskot frá nevndarlimum í Uttanlandsnevndini. Harafturat hava verið fleiri kunningarfundir og ráðførslur við Uttanlandsnevndina um átrokandi mál.

**3. "Stórar játtanir til uttanríkismál"**

Eisini roynir Edmund Joensen at mana fram eina mynd av, at Uttanríkisráðið brúkar so nógvan pening og hevur fingið játtað 30,7 mió. kr. á fíggjarlógini – eins og er henda upphædd nýggj og tikin frá øðrum økjum. Sannleikin er tann, at meginparturin av peninginum sum er játtaður til Uttanríkismál varð eisini játtaður í samgonguni undan, sum Edmund Joensen var partur av.

Tað, ið er játtað eyka til uttanríkismál í ár í mun til í fjør, eru góðar 4 mió. krónur – og tað er væl greitt frá, hvat peningurin fer til. Nevniliga at vinna føroyskum vinnnulívi, mentanarlívi og borgarum annars atgongd og møguleikar uttanlands, at gera handilssáttmálar og at røkja altjóða skyldur Føroya. Mál, ið allir flokkar hava sagt seg vilja fremja.

**4. "Føroysk áhugamál væl røkt í hvalamálinum"**

Í tíðindaskrivi fríggjadagin sigur Edmund Joensen, at føroysk áhugamál verða væl røkt í altjóða hvalaveiðinevndini, IWC, hóast Danmark atkvøður ímóti føroyskum uttanríkispolitikki og semjum, sum gjørdar eru. Hann leggur undirritaða undir at hava eina "flokspolitiska herferð móti ríkisfelagsskapinum".

Hesi tíðindi eru bæði ósonn og óskiljandi, tí undirritaði var undan samráðnum í danska fólkatinginum um hetta mál í sambandi við báðar føroysku fólkatingslimirnar og tosaði persónliga við Edmund Joensen. Tá var hann samdur við undirritaða og landsstýrið um, at Føroyar skuldu halda fast við sína støðu í hesum prinsippmáli og hann segði seg stuðla landsstýrinum, so vit høvdu eina felags støðu í Føroyum. Kortini sigur Edmund Joensen nú, tá ein meiriluti á fólkatingi gongur ímóti teirri semju, sum annars er gjørd millum stjórnirnar í Føroyum, Grønlandi og Danmark, at hetta tryggjar føroysku áhugamálini – og at trupulleikin er undirritaði (!).

Støðan er hon, at ein greiða semja millum Føroyar og Grønland og donsku myndugleikarnar er brotin, tí Fólkatingið hevur valt at fylgja ES-krøvum og krøvum frá felagsskapum og londum, ið eru ímóti hvalaveiði sum heild. Hetta hóast landsstýrið hevur fylgt øllum mannagongdum og avgreitt alt eftir bókini.

Kortini velur Edmund Joensen við ósannindum at gera undirritaða og landsstýrið til trupulleikan í málinum. Hetta er markleysa ósakligt.

**5. "Uttanríkisráðið og fundir"**

Fyrr í ár skrivaði Edmund Joensen eisini fleiri tíðindaskriv, har hann m.a. legði undirritaða undir ikki á møta á fundum í EFTA og á einum fundi millum fólkatingslimir við ein ES-kommisér. Hóast hesi tíðindi vóru ósonn, og hóast tey vórðu rættað bæði á tingi og í almenninginum, verða tey støðugt endurtikin sum sannleikar.

**Aftur til tað gamla í føroyskum politikki?**

Eg ivist í, um nakar annar politikari hevði sloppið væl frá at bera so nógv ósannindi fram, uttan at verða settur til svars í almenninginum. Men helst hugsa fólkatingsmaðurin og hansara hjálparfólk, at gongur tað einaferð, so er bara at halda fram.

Spurningurin er so bert, hvat endamálið er við hesi framferð hjá Edmundi Joensen? Tey mál, ið hann velur at leggja á við ósannindum, eru mær kunnugt breið semja um í føroyskum politikki, har vit eru samd um føroysku áhugamálini.

Men hetta er helst ímyndin av tí gamla føroyska politikkinum: Har onnur lond semjast og standa saman um nøkur grundleggjandi mál í uttanríkispolitikkinum – hóast flokkarnir eru ósamdir um innanríkispolitikk – so hevur tað verið júst øvut í Føroyum. Her verða okkara viðurskifti við umheimin til alment partapolitiskt brigsl, við tí úrsliti, at vit standa veik mótvegis okkara samráðingarpørtum. Enntá – sum í hesum førum – har ongin ósemja hevur verið frammanundan og har umboð fyri allar flokkar í Uttanlandsnevndini eru samd.

# Sjálvbjargni fyri lántar pengar

HELGI ABRAHAMSEN



**Meðan skip verða løgd og fólk ikki hava ráð at hava oljufýringina tendraða, arbeiðir landsstýrið við at gera yvirtøkur fyri lántar pengar**

Í sambandi við at stóru almennu fakfeløgini hava biðið um nýggjar lønarsamráðingar við Fíggjarmálaráðið, segði Karsten Hansen, landsstýrismaður, við Útvarpið í farnu viku, at tað er ikki serliga áhugavert at seta seg í skuld fyri eina lønarhækking.

Boðskapurin hjá landsstýrismanninum var púra greiður. Fíggjarlógin sum fyri bara nøkrum fáum mánaðum síðani skuldi hava eitt trýsifrað milliόna avlop, hevur longu eitt reelt undirskot. Allar útreiðslur, sum koma afturat, fara tí at økja um undirskotið, og mugu takast av uppsparingini, ella fíggjast við láni. Og at taka lán, fyri at fíggja eina lønarhækking er ikki serliga spennandi.

Men sama dag sum Karsten Hansen kom við hesum úttalilsinum, var freistin úti, sum politisku flokkarnir høvdu fingið frá landsstýriskvinnuni í lógarmálum, at velja umboð í ein bólk, sum skal arbeiða við yvirtøkuni av útlendingamálum og marknaeftirliti. Henda yvirtøkan kostar nógvar pengar, og tí verður spennandi at vita, um hon eisini verður fíggjað við lántøku, nú einki avlop er at gnaga burturav. Eisini aðrar yvirtøkur skulu gerast í hesum valskeiðinum, sum fara at kosta langt omanfyri 100 mió. krónur um árið. Skulu eisini tær fíggjast við lántøku? Og nær skulu lánini gjaldast aftur, og hvørjum skulu vit gjalda við, nú skipini ikki hava ráð at loysa, og fiskifrøðingar siga, at vit mugu ikki fiska tosk, og vanliga fólkið hevur ikki ráð at hava oljufýringina tendraða? – Eg spyrji bara!

Nei tað er ikki serliga áhugavert at seta seg í skuld fyri eina lønarhækking. Men tað er heldur ikki áhugavert at vera borgari í einum landi, har politikarar eru uppteknir av at gera yvirtøkur og opna sendistovur úti í heimi, heldur enn at loysa teir veruligu trupulleikarnar, sum hótta samfelagið.

Fullveldi og sjálvbjargni fyri lántar pengar, meðan fólk sita køld, - tað kunnu vit ikki brúka til nakað!

# Góði Rolf Guttesen

SJÚRÐUR SKAALE
Norðuratlantsbólkurin



Rolf Guttesen heldur, at Norðuratlantsbólkurin hevur lagt trýst á Sosialin, til tess at fáa blaðið at koma við eini umbering fyri nakað, sum Rolf hevur skrivað um virksemið hjá føroyska partinum av bólkinum. Tað eri eg.

Rolf staðfestir í Sosialinum í gjár, at "*ein politiskur bólkur leggur trýst og press á miðlar, so teir ikki tora at skriva ávís orð og meiningar. Eg skal ikki royna at seta navn á hendan tendens. Teir vilja skerja tað talu- og skrivifrælsi, sum er staðfest í okkara grundlóg § 77. Haraftrat vil eg siga, at hesin lítli bólkur á Fólkatingi spælir eitt ódámligt og ómansligt hulduspæl. Um teir meina, at nakað er í samrøðuni, sum er átaluvert, so kundu teir lagt navn til eina viðmerking ella rætting. Um teir meina, at nakað straffbart er sagt, so eru teir vælkomnir at saksøkja. Men hundarnir tora ikki.*"

Góði Rolf!

Eg las faktiskt hasa greinina um okkara virksemi. Og eg kundi ikki droymt um at klagað um hana. Hon var heilt øgiliga stuttlig!

Tíni orðatorisku evni kunnu kanska ikki samanberast við tey hjá stríðsfelaga tínum Virgari Dalsgaard, men tað er líka við. Tað er fongur í tykkum báðum tveimum. Tit eru keldur, sum vit onnur kunnu oysa av.

Tí endurgav eg eisini síðsta mikudag ein stóran part av eini grein hjá Virgari á fólkatingsins talarastóli. Allur salurin mundi flána í látri!

Eina aðru ferð, um eg fái høvi, taki eg kanska eina grein hjá tær.

So halt endiliga á, Rolf! Og eggja Virgari til eisini at hvessa sær pennin!

# Tema um sjúkraverk

NICOLINA JUSTINUSSEN
Klaksvík

Eg var ein av teimum mongu, sum sat og lurtaði eftir sendingini, nakað, sum viðkemur øllum, tað muga øll jú lurta eftir, tá tað geldur okkara sjúkhúsverk og fólk kundu ringja inn.

Tað var nú gott onkur ringdi, summi høvdu notið gott, onnur ikki, soleiðis er tað bara. Eg havi verið sjúklingur bæði í Havn og Klaksvík, har var gott at vera. Tey vóru fitt og blíð, gjørdu hvat tey kundu, nú ljóðar tónin ein annar, so nógvar atfinningar, so nógvar skerjingar, einki røkkur til, læknar fara, portørar siga upp.

Onkur nevndi vist Jón á Steig, um yvirlæknan Paula Dahl at hann skifti perir ella skrúvaði perir leysar. Hann var vist ein sparsommiligur maður, hvat mundi hann sagt í dag, eg havi nú sjálv hoyrt hann siga: Hetta var dýrasta hospital í verðini hvat mundi hann sagt í dag? Vit hoyra um hugburðsbroytingar - nú er alt jú øðrvísi í dag, sjúkrasystrarnar fyrr tær vóru til tær fóru frá fyri aldur, nú er har øðrvísi, tær renna og eru stressaðar.

So var ein spurningur sum ofta er at hoyra. Um tað skulu vera trý sjúkrahús ella eitt - sjálvandi øll trý. Tí tað sigur seg sjálvt, des nærri hjálpin er, des betri. Vit hava trý vælfungerandi sjúkrahús. Suðringar í suðri og norðingar í Klaksvík. Nú var Tvøroyrar sjúkrahús ikki so nógv við í hesi sending - bara Klaksvík. Um so alt annað nú á døgum er broytt. Sjúkrahúsrøkt og patientar tað eiga til alla tíð at fáa fyrstu røkt.

Gud signi tykkum øll, ið arbeiða við sjúkhúsverkið.